**10 ára hátíðarhald 6. mai 2011, kl. 13**
Ráðstevna í Skálanum í NLH
Løgtingsins Umboðsmaður

*Røða løgtingsformaðurin*

Góði umoðsmaður og onnur starvsfólk á stovninum. Hjartaliga tillukku við 10 ára starvsdegnum.

Verri enn so eru vit føroyingar altíð fyrstir á takinum, og tað vóru vit so heldur ikki, tá vit umsíður fingu okkum ein umboðsmann til at hava eftirlit við almennu fyrisitingini.

Á hesum øki vóru vit eini tveyhundrað ár aftaná, at tann fyrsti av slagnum sá dagsins ljós yviri í Svøríki í 1809, tá ein "Justitieombudsmann" var skipaður har.

Tað var svenski kongurin Karl hin XII, sum fekk hugskotið eftir eini vitjan hjá Turkiska sultaninum eini hundrað ár frammanundan, har hann hevði ansað eftir, at har tók ein hægri embætismaður sær av øllum kærumálum.

Orðið "umboðsmaður" er tí av norrønum uppruna, og hevur fest røtur víða hvar kring heimin allan, har hetta starvið er skipað. Fyrst í Skandinavisku londunum, seinni í New Zealandi, Bretlandi, Týsklandi, Israel, og fleiri statum og provinsum í USA, Australia, og Canada, og síðani jarntjaldið fall, eisini í londunum eystanfyri hetta nú horvna tjaldið.

Í enskum litteraturi verður hann kallaður “agent or representative” -( public official appointed to deal with individual complaints against government acts.) og har hann virkar, er hann ein "fólksins advokatur," sum fólkið kann kæra til, og sum hevur eftirlitið við myndugleikunum.

Henda ”fólksins advokat” eiga vit so ikki at fløkja saman við øðrum av sama navni.

Her í Føroyum hava vit fingið ein brúkaraumboðsmann, og í sjálvari heimastýrislógini fingu vit so eisini ein ríkisins umboðsmann.

Aðrastaðni hava tey fíggjarumboðsmann, løgregluumboðsmann, diskrimineringsumboðsmann, barna-, heilsu- og pensjónsumboðsmann fyri nú at nevna nakrar av øllum teimum mongu umboðsmonnunum, sum – um eg so má siga - halda í oyruni á myndugleikunum á ávísum nærri tilskilaðum økjum í øðrum londum.

Og lat meg so eisini nevna, at Evropasamveldið fekk sín fyrsta umboðsmann í 1995.

Hesir umboðsmenn eru av serligum týdningi fyri tey øki, har teir virkað, og okkara umboðsmaður er av serligum týdningi fyri okkara samfelagsskipan.

Tað liggur okkum sjálvandi á, ein dag sum henda, har vit taka okkum stundir til at líta 10 ár aftur í tíðina, at sóknast eftir:

- ”Hvat vit hava rokkið hesi 10 árini“ - um
- ”Løgtingsins umboðsmaður – er ein frustratión ella inspiratión“ - og um
- ”Vit sum eitt lítið samfelag í heila takið hava brúk fyri einum umboðsmanni?”

Hesum viðurskiftum fara vit so eisini at frætta nakað frá í eini røð av fyrilestrum, so sum vit síggja á skránni til hesa stevnu, og sum vit gleða okkum til at hoyra.

Løgtingsins umboðsmaður er valdur av løgtinginum. Hann hevur eftirlit við almennu myndugleikunum, og hann ansar eftir, at almenna umsitingin ikki fremur nakran órætt móti tí einstaka borgaranum.

Kært verður til umboðsmannin um avgerðir hjá myndugleikunum. Tað kostar einki at klaga til Umboðsmannin, sum so eisini tekur mál upp til viðgerðar av sínum eintingum.

Tað tók sum fyrr nevnt sína tíð, áðrenn tingið tók seg saman til at seta sítt egna umboð í hetta fyri fólkaræðið so týdningarmikla starv.

Fyrsta uppskotið fall í 1978,  næsta í 1980, meðan tað triðja bar frukt í 1982, men følnaði so kortini aftur.

Tíggju ár seinni vóru tó so nógvar skuldsetingar frammi móti almennu umsitingini, at illa bar til at lóggeva og stjórna samfelagnum uttan ein tingsins

umboðsmann, og varð hesin so eisini samtyktur á tinigi tá, men kortini ikki settur.

Sami úrslitaleysi vilji sást so eisini aftur, tá nýggja stýrisskipanin kom undir land í 1994, tó uttan nakran umboðsmann.

Tað vísti seg, at vit skuldu heilt út í aldaskifti, áðrenn tað bragdaði.

Vit fingu tá eina lóg um Løgtingsins umboðsmann, ið skuldi boðað myndugleikunum frá lýtum í umsitingini og hava eftirlit við, at landsmyndugleikar og kommunalir myndugleikar ikki gjørdu mistøk ella vanrøktu skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki framdi órætt ímóti borgarunum.

Løgtingið fekk so síðani sín fyrsta umboðsmann, Joen H. Andreassen, samtyktan í fullari semju á tingi í nov. 2000 og tann næsta í 2005, tá verandi umboðsmaður, Sólja í Ólavsstovu, tók við starvinum.

Sigast kann, at vit nú eftir tíggju ára longum royndum hava fingið ein løgtingsins umboðsmann, sum í verki hevur prógvað sítt virði í tí føroyska samfelagnum.

Umboðsmaðurin er tingsins maður og sigast skal, at tingið hevur tikið hann til sín og hevur virðing fyri honum.

Starvið er serstakt, og tað er tað einasta starvið,  løgtingið velur uttantings. Lýst verður ikki í miðlunum eftir Umboðsmanni. Tað er formansskapurin, sum finnur tann rætta persónin.

Tá fyrsti Umboðsmaðurin skuldi veljast var fyrireikingin drúgv. Formansskapurin var sera tilvitaður um, at um stovninum skuldi vera lív lagað, so galt tað um at finna tann rætta persónin. Ein persón sum var virdur manna millum.

Formansskapurin fekk umsiting tingsins at gera eitt yvirlit yvir allar royndar føroyskar løgfrøðingar, bæði innan- og uttanlands.

Tosað varð síðan um, hvør hugsast kundi vera frægast skikkaður í hesum heilt serliga starvi og mangt bendi á, at Jógvan H. Andreassen var tann rætti maður.

Spurningurin var bara, um hann fór at taka av.

Løgtingsformaðurin, Finnbogi Ísaksson, sáli, tók eitt prát við fráfarna dómaran, og væl gekst. Eftir stutta umhugsunartíð tók hann av, og var hetta eitt gott val.

Jógvan Andreassen segði beinanvegin frá, hvussu leingi hann fór at sita, og á heysti 2004 varð so aftur farið undir at leita eftir tí næsta umboðsmanninum.

Stovnurin hevði nú virkað á fjórða ári, og hevði fingið tann leiklut og ta virðing ein slíkur stovnur skuldi hava.

Rættiliga skjótt var síðani komið eftir, at Sólja í Ólavsstovu var eitt gott boð upp á tann næsta umboðsmannin, og tíbetur játtaði hon so eisini at taka við.

Undir hennara leiðslu hevur stovnurin ment seg enn meira og støðugt prógvað sítt virðið í verki. Sólja í Ólavstovu varð tilnevnd av nýggjum í heyst, og tók hon tá av at røkja starvið næstu fimm árini, og hetta fegnast vit øll um.

Føroyingurin hevur við umboðsmanninum fingið ein lættari og greiðari kærumøguleika og eina munandi hægri fatan av rættartrygdini.

Talið av kærumálum prógvaði tørvin.

At kunna yvirkæra avgerðir gjørdist ein ímyndin av vælferðarsamfelagnum, og kundi á ein hátt skiljast sum ein virðilig víðking av demokratinum. Hinvegin spøkti so eisini ein fjald nýtsla ella misnýtsla av øllum kærumøguleikum sjálvt í smærru málum, men hugsi eg, at hesi viðurskifti eru væl og virðiliga handfarin av stovninum.

Frágreiðingin frá umboðsmanninum er nú skipað sum árligt løgtingsmál sum eitt uppskot til samtyktar, ið fær vanliga fyrstu viðger, síðani nevndarviðger í rættarnevndini.

Frágreiðingin kemur so aftur úr nevnd við viðmerkingum, og verður síðan samtykt av løgtinginum.

Lóggevandi valdið fær á henda hátt eitt gott innlit í, hvussu umsitingin og samfelagsskipanin virkar upp á gott og ilt kring landið alt.

Okkurt málið er kortini, sum misprýðir myndina. Ikki av umboðsmanninum, men heldur av teirri vøkkultu samfelagsskipanini, sum ikki enn hevur sæð seg føra fyri at handfara tær lemjandi niðurstøðurnar, ið komu frá tingsins umboðsmanni fyri hálvum ári síðan mótvegis nøkrum av samfelagsins hægstu vøldum.

Eitt mál, sum umboðsmaðurin av sínum eintingum hevði tikið upp og kunnað løgtingið um.

Álvarin og atgerðarloysi í málinum hava síðani gingið hond í hond.

Tá stýrisskipanin sigur, at landsstýrismaður hevur rættarliga ábyrgd av málsøki sínum, áttu teir fremstu ábyrgdarhavandi beinanvegin at lagt øll politisk størv síni frá sær til gagns fyri politisku skipanina.

Men soleiðis er tað tíverri ikki her hjá okkum, har lítil orka og minni vilji hevur verið til at staðfesta ábyrgd og at taka skjótar avgerðir, so at avleiðingarnar ikki gerast størri enn neyðugt er fyri politisku og umsitingarligu skipan okkara.

Her hjá okkum vendir alt øvugt. Teir einastu dómarnir, ið feldir eru í miðlunum og enntá av tingsins røðarapalli, hava reinsað teir, ið áttu at hava lagt frá sær.

Ein tílík sjálvreinsandi skipan er ókend aðrastaðni.

Ákæruvaldið er eftir trimum og einum hálvum mánaða komið eftir, at tað vil einki hava við málið at gera, og politiska skipanin, er ikki enn komin á mál við at játta neyðugan pening til at staðfesta ábyrgd, og reinsa luftina, og soleiðis skapa ein virðiligan arbeiðsdag aftur í teimum ráðum, ið rakt eru av lemjandi frágreiðingini frá umboðsmanninum.

Umboðsmaðurin er tingsins álitismaður, og tann einasti av slagnum, ið óheftur er førur fyri at lýsa øll viðurskifti innan almennu umsitingina fyri lóggevandi valdinum og almenninginum øllum.

Umboðsmansins partur liggur ikki eftir í hesum máli, tvørturímóti, hann liggur ljósár frammanfyri politisku og almennu skipanina annars.

Hann hevur á sera viðkomandi hátt drigið tjøldini frá og lýst alment umsitingarligt óskil, meðan politiski myndugleikin ikki enn hevur verið mentur at rudda upp eftir sær, og er tað ein stórur vansi fyri samfelagsskipan okkara.

Eg fari enn eina ferð at siga løgtingsins umboðsmanni og starvsfólkum hansara tillukku við 10 ára degnum og stóra takk fyri eitt dygdargott og mennandi starv fyri tað føroyska samfelagið, og so fari eg eisini at ynskja tykkum øllum blíðan byr framyvir.

***Hergeir Nielsen***